# Vinnuháskúlin ein undir vangan!

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Í fjølmiðlunum í farnu viku kom fram, at vinnuháskúlin hevði tikið avgerð um at siga 3 til 4 fólkum upp, og at hesi høvdu fingið ætlanarskriv. Orsøkin skuldi vera tann, at løgtingið hevði skorið játtanina til skúlan við 2,2 mió kr, og at okkurt drastiskt mátti gerast fyri at fáa játtanina at hanga saman fyri alt árið.

Formaðurin í fíggjarnevndini var tá í bløðunum og vísti á, at játtanin til lønir var 1,2 mió kr hægri í 2009, enn brúkt var til lønir í 2008, soleiðis hevur undirritaða eisini skilt tað. Er tað so, hongur tað ikki saman, at samstundis sum lønarpuljan veksur við 1,2 mió frá 08 til 09, at fólk so verða søgd upp fyri at fáa játtanina at hanga saman. Í útvarpinum leygardagin segði landsstýriskvinnan, at MMR hevði valt at koyra nóg nógvan pening uppá til lønir, - ikki tí at hetta skuldi gjaldast sum lønir til starvsfólkini, men tí at hendan upphæddin skuldi nýtast til annan rakstur hjá skúlanum. Var hetta rætt skilt, er hetta ein sera óheppin mannagongd, sum MMR hevur valt. Hetta gevur jú løggevandi valdinum eina heilt skeiva og pyntaða mynd av, hvat landsstýrið ætlar.

Higartil er skotið viðvíkjandi sparingum á vinnuháskúlanum vent móti fyrst og fremst fíggjarnevndini og harnæst løgtinginum, men tað er mangt sum bendir á, at hundurin liggur grivin aðrastaðni í skipanini, og at tað er neyðugt at finna hann, til tess at fáa rætta møguligar villur.

**Tí soljóðandi spurning:**
Hví hava 3 til 4 fólk á vinnuháskúlanum fingið ætlanarskriv um uppsøgn, tá ið skúlin hevur fingið 1,2 mió kr meira játtaða til lønir í ár enn brúkt var í 2008.

Í útvarpinum kom eisini fram, at bachelor útbúgvingin mátti útsetast, tí játtanin var skorin, og at man ikki ætlaði at taka maskinistar inn í ár, tí játtanin var skorin í mun til tað sum biðið var um. Men í viðmerkingunum í álitinum frá fíggjarnevndini stendur at: “Landsstýrið hevur boðað frá, at skúlin bert fer at taka lesandi inn eina ferð árliga, og ætlanin við einum fyrireikingarflokki til hægri lestur verður ikki sett í verk í 2009 “ hetta boðaði landsstýrið frá væl áðrenn nøkur skerjing varð framd og áðrenn álitið frá fíggjarnevndini kom til 2. viðgerð.

Tað vil siga, at um tekstúrin í viðmerkinugunum í álitinum er rættur, var ongantíð ætlanin hjá MMR, at vinnuháskúlin skuldi byrja bachelor útbúgvingina í ár. So tað er ikki har, at sparingin rakar. Hóast hetta hevur verið nýtt sum grundgeving!

Men so er tað maskinistaútbúgvingin. Hon er neyvan umfatað av orðingini um, at *skúlin bert fer at taka lesandi inn eina ferð árliga*. Tær viðmerkingarnar verða, sum eg skilti tað, meintar við maskinmeistaraútbúgvingina og navigatørútbúgvingina, sum vanliga tóku næmingar inn tvær ferðir árliga.

Tað vil siga, at skúlin, sum vanliga tók maskinistar inn á hvørjum ári, hevur valt at sleppa hesi útbúgvingini í ár orsakað av sparingum. Verður sagt!

**Tí soljóðandi spurningar**
Hvussu nógv sparir skúlin við ikki at taka ein maskinistaflokk inn í ár.

Er ongin møguleiki fyri at finna hendan pening á verandi játtan, tá ið hugsað verður um, at játtanin til lønir er 1,2 mió kr hægri í 2009 enn í 2008?

Hesir fyrispurningar verða settir Helenu Dam á Neystabø í løgtinginum mikudagin.

# Íslendskar byggifyritøkur og íslendskir handverkarar eru møguliga ikki skattskyldigur í Føroyum

TOM SILVURDAL
verkfrøðingur



Henda rætt hava okra fólkavaldu og embætisverkið langt síðan tryggjað teimum við at hava samtykt, at eisini Føroyar skulu vera partur av tí norðurlendska dubultskatta sáttmálanum.

Ein útlendsk fyritøka, sum er sáttmálabundin til eitt ávíst arbeiði í Føroyum, er ikki skattskyldug í Føroyum, um hon lúkar treyturnar í norðurlendska dupultskattasáttmálanum.

Útlendsk arbeiðsmegi sum kemur til Føroyar, antin í starvi hjá t.d. TG-Verk ella í starvi hjá útlendskari fyritøku, sum kemur her, sum sáttmálabundin undirarbeiðstakari hjá t. d. TG-Verk, er heldur ikki skattskyldug í Føroyum, um hesi arbeiðsfólk lúka treyturnar í norðurlendska dupultskattasáttmálanum.

Hesar fyritøkur skulu tí ikki gjalda lønir gjøgnum ta føroysku skattaskipanina. Tær gjalda lønir sum vanligt gjøgnum skipanina, sum er galdandi í tí landi, har fyritøkan er skrásett.

*Tað sum er skrivað omanfyri kunna øll fáa staðfest við at venda sær til TAKS og biða um avrit av hesum sáttmála.*

Tað kundi tí verið eitt uppskot at hesir fingið sær eitt avrit - Vinnumálaráðið - Løgtingslimir - vinnuhúsið - Arbeiðsmannafeløg - Fjølmiðlafólk. Setið tykkum í samband við TAKS og fái eitt avrit.

Tað almenna Føroyar, og okur stuðla hesum, hevur samtykt, at føroyingar skula hjálpa til at fáa grannan aftur á føtur. Hesin liggur í løtuni.

Tí kann tað ikki vera meiningin at seta lógir í gildi, sum beinleiðis forða hesum.

Sambart norðurlendskari hugsan skal norðurlendsk arbeiðsmegi og fyritøkur kunna ferðast frítt millum norðurlond.

Føroyar eru partur av hesari hugsjón. Tí kunna okur ikki fara at løggeva ímóti hesari hugsjón! Tað ber ikki til.

Mín áheitan til okra fólkavaldu vil tí vera, latið vera við at gera annað enn at biðja TAKS halda efturlit við at landsins skattalógir vera hildnar, tá ið útlendskar fyritøkur og arbeiðsfólk koma hendavegin.

Hettar kan gerast við at biðja um avrit av sáttmálum v.m. - allar útlendskar fyritøkur skulu M.V.G. skrásetast í Føroyum.

Um tær ikki hava sáttmála, sum uppfyllur treyturnar í dupultskattasáttmálanum, eru tær skattskyldugar í Føroyum frá 1. degi at rokna.

Hettar kann TAKS gera teimum greitt og syrgja fyri at hettar verður yvirhildið.

Um útlendska fyritøkan gerst skattskyldug í Føroyum, skal øll lønin gjaldast umvegis ta føroysku skattaskipanina.

Tá skuldi verið møguligt hjá politikkarum at kunna staðfest, um tað eru lønarviðurskiftini í t. d Íslandi, sum gera at føroyskar fyritøkur ikki longur tykjast vera kappingarførar. Mest sum yvir eina nátt.

Livst so spyrst.

# Eftirskúli í Føroyum?

JOHN S. MYLLHAMAR



Hvalba er ein av vakrastu bygdum í landi okkara. Grønt, slætt og frítt er fyri, bæði í eystur og vestur. Eitt vakurt útsýni eystur í hav, har Lítla Dímun við sínum serstaka, vistfrøðiliga fenaði, hevjar seg upp úr Suðuroyarfirði. Bygdin eigur eisini raskar, dugandi sjómenn, ið hava dirvi og áræði at taka stig og fara undir virksemi, og sum vága fyri at vinna. Tað vísa eitt nú trolararnir, sum bygdin beint nú hevur ognað sær, hóast búskaparlig myrk skýggj á luftini. Prosentvís eiga teir flestu trolarar í landinum, sum eisini eru av bestu fiskiskipum. Tí eigur ein slík bygd at fáa bestu sømdir, so at virksemi og trivnaður mennast.

Men projektið við einum eftirskúla, sum ætlanin er at byggja í bygdini, er oyðsladur peningur. At tveita 90 milliónir niður í ein eftirskúla í Hvalba ella hvar hann nú skuldi staðið í landinum, er ikki serliga skilagott. Vit hava roynt føroyskar eftirskúlar í Danmark, enntá tveir, fyrst í Genner í Suðurjúttlandi, síðani var flutt til Hygum í Vesturjúttlandi, har undirvísingin helt uppat á heysti 1999, tá skúlin læt aftur, tí næmingatalið var fallið so nógv, at fíggjarligt grundarlag var ikki at halda fram við virkseminum. Báðir skúlarnir eru sostatt dottnir niðurfyri. Aðrar orsøkir fyri at skúlin ikki gekk, skulu vit ikki koma inn á. Men fryktast kann fyri, at tað sama hendir við einum slíkum skúla í Føroyum, um hann so stendur í Hvalba, Sandavági, Leirvík, ja, ella í Havn. Vit skulu hava í huga, hvat tað er fyri aldursbólkur, sum skal heimanífrá og ikki sleppur til hús aftur í eina viku. Nøkur føroysk ungfólk velja kanska at taka eina 9. ella l0. floksroynd á donskum eftirskúla, men er hetta talið ikki minimalt? Og hvussu mong fara í hesum tíðum at leita sær til onkra ávísa bygd í Føroyum at ganga í skúla? Sum er, eru trupulleikar, bara grannabygdir leggja skúlar saman, tí frástøðan frá heiminum gerst ov long.

Skal farast undir ein slíkan veldigan skúlabygning, átti í hvussu so er í fyrsta umfari verið gjørd ein royndartíð, um grundarlag og áhugi er fyri honum. Tað hevði møguliga borið til at brúkt part av bygdarskúlanum, ella leigaði hølir, t.d. er ein stór ítróttarhøll í bygdini, sum í eitt skiftið kundi verið innrættað til endamálið. Tíverri standa eisini nógv sethús tóm í Suðuroynni. Tað hevði borðið til at leigað okkurt av hesum til næmingar - hvussu mangir teir nú verða, ið koma aðrastaðni frá úr landinum. Hetta hevði so kosta nógvar tíggjutals milliónir minni. Tað hevur so altíð verið hildið skilagott at royna seg fram og at byggja seg upp frá grundini. At gera skorsteinin fyrst, er ikki so klókt. Gerst skúlin tann succes, ið onkur møguliga heldur, ja, so kundi verið farið víðari. Tó kann væntast, at ein slíkur skúli verður bara eitt upplop, síðani kemur bygningurin at standa sum eitt av teimum nógvu rædandi minnismerkinum kring landið - ið standa, ella liggja - og minna á skeivar millióna íløgur.

Tær 90 milliónirnar høvdu nokk komið til størri nyttu í Hvalba, um tær vóru brúktar til eitt nýtt berghol, at bøtt um havnalagið, og aðrar skapandi íløgur í bygdini. Hvalba fekk fyrsta tunnil í Føroyum fyri skjótt 50 árum síðani. Hann er als ikki tíðarhóskandi, tí hann er ikki gjørdur til ta ferðslu og til tað flutningsmynstur sum í einogtjúgundu øld fer fram uppi á landi.

Hvalbingar fara nokk at klára seg so leingi nakað er at taka upp úr havinum. Men ein eftirskúli fer ikki at menna bygdina, so mikið eru tíðir broyttar síðani háskúlatíðina "i de gode grundtvigske dage".

-so eru tit við!